

# Rúsdrekkasølan skal lyftast upp á eitt hægri tænastustig

## Leiðari til handilin í Tórshavn søkist

Í handlinum í Havn starvast millum 11 og 17 fólk (søla og goymsla), og sølan liggur um 50 mió. kr. árliga. Handilin í Havn stendur fyri knapt helminginum av samlaðu søluni hjá Rúsdrekkasøluni og er tí ein týðandi táttur í virkseminum hjá Rúsdrekkasøluni.

Viðkomandi, ið settur verður, skal standa fyri leiðsluni av handlinum í Havn, herundir service-management, resursu- og fíggjarstýring, sølu og starvsfólkaleiðslu. Í sambandi við at Rúsdrekkasøla Landsins setur fokus á at menna tænastuveitingar sínar, skal viðkomandi duga at standa á odda fyri hesari menning á sínum starvsøki.

Aftur at dagligu leiðsluni fevnir arbeiðið eisini um tvørgangandi arbeiðsuppgávur, leypandi ad hoc uppgávur, íverksetan og verkætlanarleiðslu. Arbeiðsuppgávan er breið og fjølbroytt, og tí er neyðugt við góðari stýring og fokusering.

Leiðarin í handlinum vísir til sølu- og tænastuleiðaran.

### Faklig førleikakrøv

- Merkantil útbúgving (hægri/millumlong útbúgving) ella annar javntstillaður førleiki saman við viðkomandi leiðsluroyndum.

**Herundir førleikar innan**

- Service Management
- Business Development
- Broytingar- og starvsfólkaleiðslu
- Resursu- og fíggjarstýring

### Persónligur profilur

- Menningarsøkin
- Góð tænastuevni
- Innovativt og skipað arbeiðslag
- Fíggjarliga røkin
- Góð leiðslu-, samskiftis- og samstarvsevni
- Dugnaligur sparringspartnari (coaching)

### Setanartreytir

Setanartreytirnar eru sambært sáttmála millum avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið.

### Umsóknir

Skrivlig umsókn við CV, avriti av prógvum fyri førleikakrøv og møguligum viðmælum skal vera Rúsdrekkasølu Landsins í hendi í seinasta lagi 23. apríl 2009 kl. 12.00. Umsóknirnar skulu sendast til: Rúsdrekkasølu Landsins, att.: Elsa Maria Holm Olsen, Hoyvíksvegur 51, FO-100 Tórshavn.

Vilt tú hava meira at vita um starvið, vinaliga set teg í samband við Elsu Mariu Holm Olsen, stjóra, á tlf. 580 129 ella á emo@rusan.fo ella við Guðrið Ellefsen, sølu- og tænastuleiðara, á tlf. 580 126 ella á gudrid@rusan.fo.

**Rúsdrekkasøla Landsins**
*Hoyvíksvegur 51 Postboks 3069 FO-110 Tórshavn*
*Tel (+298) 31 42 77 Fax (+298) 31 22 60*

SENDISTOVAN




FT Samskifti mennir, marknaðarførir og selur tænastur, sum Føroya Tele veitir fyritøkum og einstaklingum. Á Rakstrardeplinum arbeiða 27 starvsfólk, og depilin hevur ábyrgd av at menna og reka tøkniligu útgerðina.

Vit kunnu bjóða einum komandi starvsfelaga góðar møguleikar fyri fakligari og persónligari menning, umframt góðar og nýmótans arbeiðsumstøður.

**Arbeiðsinnihald**
Arbeiðið fevnir um umsiting av nýggja hýsingarumhvørvinum á Føroya Tele, so sum VMware, VPN-loysnir, Cisco og ymiskar servaraloysnir.

Arbeiðið fevnir eisini um at menna verandi internettænastur, herundir:
- ráðgeving til viðskiftafólk
- menning av nýggjum hýsingar- og internettænastum
- rakstur av highend ciscoútgerð
- forritan av serútgerð

Vit ímynda okkum, at tann, ið fær starvið, hevur:
- royndir í framkomnum hýsingar- og vevloysnum
- hugsjónir um internetið
- góðan kunnleika í enskum
- nærlagni og sjálvstøðugt arbeiðslag
- jaligt sinni og góð samskiftisevni
- viðkomandi tøkniútbúgving ella drúgvar royndir á økinum

Fyrimunur er at hava førleikar og royndir innan:
- VMware ESX
- Ciscoútgerð, herundur VLAN
- Windowsskipanir sum Exchange og MOM
- IIS/Apache vevservarar
- TCP/IP og internet
- Linux

**Umsóknir**
Umsóknir við avritum av CV og viðkomandi skjølum skulu vera starvsfólkadeildini í hendi í seinasta lagi mánadagin 27. apríl 2009 og skulu sendast til:

Føroya Tele
Starvsfólkadeildin
Postrúm 27
110 Tórshavn

ella til:
starvsfolkadeildin@ft.fo

Fleiri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Páll Wiberg Joensen á tel. 243521 ella á pwj@ft.fo. Eisini ber til at venda sær til starvsfólkadeildina á tel. 303030.

FT Samskifti er dótturfelag í Føroya Tele. Í felagnum er øll kundarøkt, øll søla og alt samskifti við privatkundar og vinnukundar, alt GSM-samskifti og øll staðarútgerð til fastnettelefoni og breiðband. Í felagnum starvast gott hundrað fólk. Tænastur frá FT Samskifti verða marknaðarførdar undir navninum Føroya Tele.

FØROYA TELE

SENDISTOVAN